## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hann minkar vindin niður í lot av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri og um midnáttina regn. Hitin kemur upp í 7 til 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Um morgunin strúkur í vindi av suðri og regn, men seinnapartin minni vindur av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 7 og10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, týsdagin hækkar hann upp í útnyrðing. Sólglottar, men okkurt ælið týsdagin. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Axel misti álitið á telduni

**Fyrrverandi kvívíkspresturin, Axel Tórgarð, byraði at týða Ringanna Harri á teldu, men tá teldan sveik, vendi hann aftur til pappírið og pennin. Hósdagin kom onnur bókin í tríverkunum hjá Tolkien um Ringanna Harra út á føroyskum**

BÓKAÚTGÁVA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*Axel Tórgarð er komin á mál við at týða tey trý verkini um Ringanna Harra til føroysk. Hósdagin varð onnur bókin um tey tvey tornini útgivin.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hann er farin um tey 80, og hann er framvegis ein knassi. Fyrrverandi presturin úr Kvívík, Axel Tórgarð, er liðugur at týða øll trý verkini um Ringanna Harra til føroyskt. Hósdagin varð onnur bókin, Tvey Tornini, í tríverkunum hjá J. R. R. Tolkien á føroyskum løgd fram í Gamla bókhandli í Havn.

Axel hevur týtt allar tríggjar bøkurna r við hond, og tað má sigast at vera eitt bragd, at hann er komin á mál við at týða hesa heimsgitnu skaldsøguna til føroyskt.

Axel byrjaði at týða fyrstu bókina um Ringanna Harra á teldu, men tá hon sveik, vendi hann aftur til pennin og pappírið. Sonur Axel, Hans Tórgarð, hevur innskrivað týðingina hjá pápanum inn á teldu, so sonurin eigur eisini sín part av útgávuni av Ringanna Harri á føroyskum. Kápuna á teimum Tveimum Tornunum um hevur Tróndur Patursson prýtt.

Triðja bókin í røðini um Ringanna hevur Axel Tórgarð longu týtt, men enn er óvist, nær hon verður givin út.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | – |
| Seyðisfjørður | – |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 14 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 8 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 10 |
| Róm | – |
| Malorca | – |
| Athen | 18 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | 13 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 18 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 982 hPa. norðan fyr Ísland fer í landnyrðing og grynnist. Eitt hátrýst, 1027 hPa. vestan fyri Biscaya fer í landnyrðing og mennist.




Hátrýstið sunnan fyri Írland stendur mestsum í stað og ein hátrystryggur til Føroya fer eystureftir. Eitt lágtrýst, vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum við lýggjari veðri.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/11 kl. 06[00]–04/11. 06[00]. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 03/11 kl. 06[00]–04/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 6,1 mm


GEVIÐ BLÓÐ
Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 304522
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo



I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

2. november: Mánin longst frá jørðini
5. november: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 5. nov | 00.21 | 12.56 | 11.56 | — | - | 12.11 | 02.21 | 14.56 | 03.21 | 15.56 | 11.11 | 23.45 | 10.11 | 22.45 | 00.36 | 13.11 | 01.36 | 14.11 | 00.06 | 12.41 | 01.21 | 13.56 |
| 6. nov | 01.30 | 14.04 | 00.30 | 13.04 | 00.45 | 13.19 | 03.30 | 16.04 | 04.30 | 17.04 | — | 12.19 | 11.19 | 23.38 | 01.45 | 14.19 | 02.45 | 15.19 | 01.15 | 13.49 | 02.30 | 15.04 |
| 7. nov | 02.23 | 14.42 | 01.23 | 13.42 | 01.38 | 13.57 | 04.23 | 16.42 | 05.23 | 17.42 | 00.38 | 12.57 | 11.57 | — | 02.38 | 14.57 | 03.38 | 15.57 | 02.08 | 14.27 | 03.23 | 15.42 |
| 8. nov | 03.01 | 15.20 | 02.01 | 14.20 | 02.16 | 14.35 | 05.01 | 17.20 | 06.01 | 18.20 | 01.16 | 13.35 | 00.16 | 12.35 | 03.16 | 15.35 | 04.16 | 16.35 | 02.46 | 15.05 | 04.01 | 16.20 |